## VIÐMERKINGAR

## Seyðasýning í Skálavík

**Palli Dalsgaard**



Leygardagin í farnu viku var seyðasýning her í bygdini. Sýndir vóru brundseyðir úr øllum eysturbygdunum, Skálavík, Húsavík, Dali og Skarvanesi. Hettar er fyrstu ferð, at seyðasýning hevur verið her á plássinum, men á oynni hevur seyðasýning verið fyri árum síðan.

Tað er skopuningurin Eynar Martin Kjærbo, sum er blivin bóndi her í bygdini, ið hevur tikið stig til hettar tiltak, tað skal hann hava tøkk fyri, tí eitt slíkt tiltak skapar nakað, tað setur lív í har dekan og deydligt er framman undan.

Hann hevur, síðan hann kom í bygdina, lagt seg eftir at fáa betri seyð við at gera betri við seyðin, og har eru møguleikarnir so ymiskir. At fáa menn at koma til eina slíka sýning ger eisini sítt til, at hugsað verður meira um at fáa góðar og vakrar brundir. Tað er nakað av fyrireikingararbeiði til at fáa eitt slíkt tiltak upp at standa, men hann hevur havt gott fólk at hjálpa sær, og tá er tað mikið lættari. Sigast má, at væl varð fyrireikað. Sýningin var í gamla fiskahúsinum við bátahylin, har vóru krubbur uppsettar, sum seyðirnir gingu í, og borð við smurdum breyði og køkum, kaffi og the, til tey at fáa sær, sum vildu hava ein heitan munn. Tað vóru ikki einans eigarar av brundseyðum, sum møttir vóru, áskoðarir vóru í hópatali úr øllum bygdunum, og ikki sørt av konufólki. Tú sá við tað sama, tú nærkaðist plássinum, at nógv fólk var til sýningina, tí uttanfyri stóðu millum 30 og 40 bilar umframt traktorar, tað var sum tá grind hevur lagt beinini á oynni.

Einki er av ivast í, at ein seyðasýning, sum hendan, hevur alstóran týdning fyri seyðahaldið, hon ger, at menn leggja sær nær til at sleppa teim vakrastu brundunum og gimburlondunum, tá hagreiðast skal og hagin verður avgjørdur um heystið. Brundseyðirnir vóru 63 í tali, og vardi sýningin frá kl. 10.00 til út á seinrapartin, tá høvdu eigararnir fingið at vita, hvat sýnsmennirnir meintu um teirra seyð.

Sigast má, at tiltakið eydnaðist væl í allar mátar. Men vit sum tilkomin eru í dag og minnast neytaframsýningarnar, sum vóru undan og undir krígnum, vit saknaðu tann gleimin, ið mangan var aftaná á sýningarnar, tá premiurnar vóru útbýttar. Tey sum ikki fingu ta premiuna, tey høvdu væntað sær at fáa, vóru alt annað enn blíð. Og harðligur orðadráttur var mangan millum bæði mann og kvinnu, og ikki at tala um tey forhánisligu orð, sum fullu um skrivstovumenn úr Havn, sum dittaðu sær at koma suður at siga fólki, hvussu ein kúgv skuldi síggja út. Tann gamla sjarman er farin, sum so mangt annað.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Marius Gardshodn**

ættaður úr Elduvík, búsitandi í Tórshavn

andaðist í heiminum fríggjadagin 22. november 68 ára gamal.

Jarðarferðin verður týsdagin kl. 13.00 úr Vesturkirkjuni.

*Vegna tey avvarðandi*

**Annelisa, Edna, Óli og Kelna Maria**

# Jógvan Bóndi í Oyndarfirði

## til minnis



Hann var sín egin, heilt egin. Hann setti egnu dagsskrá. Hann legði ikki so nógv í hvat onnur søgdu, hann livdi sítt egna lív og var nøgdur við tað. Tað er Jógvan Bóndi, Jógvan Høgnesen, av Grundlendi í Oyndarfirði, Grunnlendsbóndin, her skrivað verður um. Eyguni brustu fríggjamorgunin, væl yvir áttati ára gamal.

Hann var ein partur av bygdini, í bøttum yviralls klæðum og alpuhúgvu, stórum svørtum eygnabrún og eitt sindur boygdur framá á ellisárum. Hann var ein provo í verumáta og eisini hvussu hann gekk ílatin gerandis. Hann legði ikki eitt plagg frá sær, uttan at tað var so útslitið, at ongin dugur var í tí longur. Tað gav at bíta einaferð teir skuldu fara á fjall og yvirallsbuksurnar vóru sjónskari stoppaðar enn nakrantíð. Tá tók Esmar Dahl, bóndi, sáli til: »Jamen góðasti Jógvan, kemur tú á fjall við broderaðum gini.« Og tað var ikki undarligt at Esmar undraðis, tí siður var í Oyndarfirði at fara í góðum, reinum og heilum klæðum á fjall.

Og hví so skriva um ein serling, ein gamlan drong, millum manna mangan eitt tvørball, sum næstan alt sítt lív hevði hildið seg innannesja í Oyndarfirði og sum púrasta einki helt um nýggju tíðina, íð eg eri eitt barn av.

Jú, tí Jógvan Bóndi fekk stóran týdning fyri meg og mín uppvøkstur. Hóast karmurin um verðsliga lívið var í Oyndarfirði, so ferðaðist hugur hansara víða um, hann hevði stóran áhuga fyri heimspeki, søgu og bókmentum, og hann vakti ein neista í mær, við at oysa av tí hann hevði nomið sær av griskum heimsspekingum fyrst og síðan teimum sum fylgdu upp gjøgnum tíðina. Hann helt so øgiliga nógv av abbabeiggja mínum, Hans Marius Eidesgaard, skaldi, og hesin hevði vakt hansara áhuga fyri bókmentum. Hans Marius, sum kom nógv í barnaheimi á Grundlendi, var anna orðið, tá góða lag var á Jógvan Bónda.

Í stovuni hjá Jógvan sá eg fyrsta bókasavnið í lívinum. Einir fýra favnar av bókum og eg helt hetta var ein øgilig rúgva. Onkra bókina lænti eg, og aðrar hoyrdi eg hann oysa av. Eg skilti ikki so nógv av tí hann greiddi frá, men kendi tað aftur seinni í lívinum, tá mítt forvitni leitaði somu slóðir sum Jógvans.

Í allari almindiligheit, so varð tað ikki hildið so nógv um tað sum Jógvan læs, millum bygdarmenninar í Oyndarfirði. Her var toskur annað orðið, missión, seyður, jørð, pengar og vanlig neringssorg. Hvat skulu vit við hasum høgt flúgvandi tvætlinum. Tú lesir bara fyri gera teg klókari enn hini, at hevja teg upp um okkum, var vanlig hugsan. Men Jógvan legði sektin á, honum dámdi hugsaninar uttan úr heimi, og ein lítil rebellur var hann. Hann elskaði Zola og Goethe. Og hesin seinni er kendur fyri at siga, at kennir tú ikki søguna minst 3000 ár aftur í tíðina, so livir tú frá hondini til munnin.

Pápi mín Leivur, Frits og Jógvan Bóndi vóru vinmenn. Teir vóru ikki heilt javngamlir, pápi var yngst, Jógvan fylti á flaggdegnum hvørt ár og Frits tókst ikki við nakað so verðsligt sum føðingardagar, hóast hann eldist eitt ár hvør árið eins og øll onnur. Nú er tann seinasti farin av hesum vinmonnum og minnini reika. Og tað eru flógvir tankar eg havi um teir tríggjar, nú eg siti og skrivi og síggi teir fyri mær, fyrr á lívsleiðini.

Onkuntíð varð í allari hemmiligheit ein kassi bestiltur av vinmonnunum og so bleiv hann smuglaður av posthúsinum hjá Posta Lenu og antin niðan til Jógvan, heim til Frits og enntá inn til okkum. Kassin lat dyrnar upp á víðan vegg til mentunnarheim Jógvans og meðan tað fjaraði skjótt í løginum, vóru yrkingar havdar á lofti, við tárum á kinn. Platon varð vigaður upp móti lærumeistaranum Sokrates og Poul F bleiv lyftur himmal høgt sum geni og spottari alt eftir hvussu lagið var, og hvussu langt var ligið út á náttina. Dagarnar aftaná sást hann ikki. Tað segðist, at tungsinnið hvíldi yvir honum og nátt var í sál, har hann sat einsamallur í einbýli sínum, meðan hann ernerdi seg við niðursodnaðari frukt úr blikkum fyri at vinna heilsuna aftur Tá tú so hitti hann aftur, uppafturstadnan, og minti hann á onkra geniala poetiska útlegging, hann hevði snikkað til í verstskapinum, so svaraði hann smílandi. »Jæ, jæ, jæ, forstendur tú! Og so einki meira um tað. Lívið gekk víðari, ein dag í senn.

Og lívið gekk víðari hjá Jógvani í tí stilla gerningi at vera bóndi. Jógvan dámdi væl vísa Salomon í Halgu bók og lat okkum byrja hendan parti av lívi hans við einum av orðtøkum Salomons. »Lat ein annan rósa tær og ikki tín egna munn, ein fremmandan og ikki tínar egnu varrar.« Orðt. 27.2

Jógvan var bóndi og tann næstseinasti av røðini av Grundlendsbóndum í óbrotnari linju nógv ættarlið aftur í tíðina. Um Jógvan var bóndi, tí hann hevði hug, ella tí hann skuldi vera tað, havi ongantíð fingð rættuliga greiðu yvir. Men bóndi var hann burturav og hann bar ikki bara arvin víðari. Hann legði slett ikki so lítið eftir seg sum bóndi. Avrikini tala fyri seg, hóast tað hevur verið lítið mett, tað menn leggja í jørðina, síðan Føroyar broyttust frá at vera eitt bóndasamfelag til fiskiveiðusamfelag. Hetta eru skrivaðar heilar bøkur um.

Jógvan fór sum ungur á royndarstøðina í Hoyvík at nema sær kunnleika til nútímans jarðarbrúk. Og tú sær tað aftur í bønum, at hann lærdi í Hoyvík. Garðurin er fimm merkur og Jógvan velti hann, næstan allan, frá gomlum kornteigalendi til stórar samanlagdar teigar, sum maskinur kundu arbeiða á. Jógvan var av kvikastu veltarum. Ongin í Oyndarfirði velti so stórar bøkkar sum hann. Trý stikk við hvassa spakanum, síðan upp í luftina og har lá hann snøggur, svartur og blankur og passaði fullkomiliga millum hinar bøkkarnar, íð lógu við svørinum niður. Eg royndi, at gera honum kunstin eftir, Petur farbróður við, men ikki fingu vit teir so snøggar sum Jógvan. Har var einki gart og hann velti dupult so skjótt sum vit. Og so fekk hann ein traktor, eg var smádrongur tá. Framman fyri traktorin, ið eisini var sláimaskina, var ein vognur og tað var eitt satt rumsterilsi í bygdini, tá Jógvan fyrstu dagarnar koyrdi við traktorinum, við einum riðli av smádreingjum kring seg.

Jógvan var arbeiðssamur og lítið sást til hann. Hagin var tá, áðrenn vegurin kom í 1968, sera óhøgligur og hetta steðgaði ikki Jógvan at byggja ikki færri enn trý seyðhús av Fløðhamri og fram á Rust. Alt hetta er gjørt í mínari tíð og tilfarið borið á herðum Jógvans. Jógvan gjørdi mannsverk millum høg fjøll í einum tí herviligasta kavaplássi í landinum. Hann gjørdi mannsverk einsamallur, nógv legði hann eftir seg og lítið rós fekk hann fyri tað.

Jógvan skilti ongantíð landbúnaðin í Føroyum í dag. At alt græsið í Oyndarfirði varð koyrt niður í seyð. Hetta var heilt vitleyst í hansara verð, tí tað sum fekkst burtur úr øllum stríðnum av hoygging, at draga og leggja fyri, stóð slett ikki í mun til tað sum sást aftur á ásinum í hjallinum. Seyður í Oyndarfirði vigar vanliga millum 24-32 pund, um hann einki hoyggj fær. Gevur tú honum allan veturin inni, so hækkar vektin nøkur fá pund, men hetta stendur slett ikki mát við stríðið. Tá Jógvan var ungur, fór hoyggið niður í neyt, sum síðan góvu mjólk. Seyður var slett ikki tikin inn og fekk bara stutta tíð á árinum, ring ár. Tey flestu hoyggjhús í Oyndarfirði eru bygd í Jógvansa tíð og bara verðagjólvingar vórðu tiknir inn.

At so Jógvan var slóðbrótari, og gjørdist seyðabóndi seinastu árini, hann sat við festinum, kann man júst takka framskygninum fyri. Hann bygdi fjós inni í Prestbø og fór undir at geva súrhoyggj. Men vanlagna kom í og tey fýra neytini doyðu øll av spillu í súrhoygginum. Eg gloymi ongantíð aftur sum smádrongur, dagin, tá neytini vóru drigin eftir halanum oman í bygdina og vórðu koyrd burtur. Ein dyggur smeitur var hetta fyri Grundlendsbóndan.

Lívið er ein bíðirøð. Vit liva okkara avmáldu tíð og tá vit fara, koma onnur til. Pláss er ikki fyri øllum, flytir deyðin okkum ikki inn í ævinleikan, sum er absolutta hæddarpunktið í lívinum.

Jógvan bóndi er farin, hansara næstu fara at sakna hann, vit í grannalagnum fara eisini at sakna hann, bygdin fer at sakna hann. Eg minnist hann við einum smíli og takki honum fyri vinarlagið og fyri tann lærdóm eg nam, tí hann var akkurát sum hann var.

Friður verið við minninum og vit síggjast Jógvan Bóndi

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**



# Góður svartkjaftur við Íslandsmarkið

**Sunnukvøldið hevði Næraberg 330-340 tons av surimi og 150 tons av mjøli.**
**- Tað hevur verið meira at fingið her vesturi, og svartkjafturin hevur verið betur, segði Andor Isaksen, skipari, tá ið vit høvdu hann í telefonini sunnukvøldið**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Síðan Næraberg fór vestur móti Íslandsmarkinum at royna, hevur meira verið at fingið, og svartkjafturin hevur verið betur*

Hesin túrurin hjá Næra-bergi, sum ikki er liðugur enn, byrjaði, 17. oktober.

Síðan byrjanina, hava tey útvið 80 fólkini umborð virkað næstan 600 tons av surimi og 300 tons av mjøli. Skipið var inni og bunkraði fyri góðum tveimum vikum síðan og hevur verið til fiskiskap síðan. Umhugsað verður nú at koma innaftur at bunkra fyrst í komandi mánaði, helst 4. desember, og síðani er ætlanin at royna eina tíð aftrat.

### Betri slag

Sosialurin hevði Andor Isaksen, skipara, í telefonini sunnukvøldið.

Hann sigur, at tað hevur gingið betur, síðan teir vóru inni og bunkraðu seinast.

- Vit byrjaðu vestur av Skeivabanka, men hava seinastu tíðina roynt vestur ímóti Íslandsmarkinum – at kalla norðanvert vestur úr Mykinesi.

Andor sigur, at svartkjafturin hevur verið størri har vesturi, og fiskiskapurin hevur verið betur.

- Eitt sindur hevur verið at fingið alla tíðina síðan 17. oktober, men meira er komið burtur úr framleiðsluni, nú fiskurin í seinastuni hevur verið størri. Vit hava ikki havt fulla framleiðslu alla tíðina, men eru okkurt samdøgur komin uppí eini 40 tons av surimi. Tað er rímiliga gott.

Skiparin sigur, at tá ið nóg mikið hevur verið at fingið, og fiskurin hevur verið av tí allar besta, hevur surimiframleiðslan okkurt samdøgur verið uppi á 60 tonsum, men tað er undantaki, og soleiðis hevur tað ikki verið hendan túrin.

- Vit eru nøgd, tá ið framleiðslan av surimi kemur upp ímóti 40 tonsum um døgnið, sigur hann.

### Skiftandi veður

Síðan Næraberg fór útaftur eftir bunkringina fyri stívliga tveimum vikum síðan, hevur veðrið verið rættiliga skiftandi og meira at kalla ólagaligt, men tað hevur tó verið roynandi.

Høvuðsframleiðslan umborð á Nærabergi er surimi. Slógvið og tann smæsti fiskurin fer til mjøl.

# Rainbow Seafood selir frystar fiskavørur til USA

**Menninir aftan fyri felagið hava fleiri ára royndir innan fiskasøluvirksemi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tveir fyrrverandi starvsmenn hjá Føroya Fiskasølu, Per Mikkelsen og Regin Mikkelsen, hava nú stovnað egna fyritøku, Rainbow Seafood, sum húsast á Gundadalsvegi 27 í Havn.

Per fór úr starvi og Fiskasøluni, 1. april, og Regin fór, 1. juli.

Herfyri var felagið alment skrásett.

### Selja til USA

Saman við Mikkelsen-monnunum, er eisini ein amerikumaður partur av Rainbow Seafood. Sum skilst, hevur hesin stóran kunnleika til amerikanska marknaðin.

Per sigur, at felagið fer at virka sum ein fiskasøla, ið serliga fer at leggja seg eftir amerikanska marknaðinum.

- Vit fara at keypa frystar fiskavørur og selja tær á amerikanska marknaðinum.

Sum skilst, verður talan um ymisk sløg av framleiðslum úr toski og hýsu, eitt nú 5-pund og fløk.

Spurdur, um avtalur longu eru gjørdar við virkir um keyp av vørum, sigur fiskasølumaðurin, at ymiskt er komið uppá pláss.

- Men virksemið hjá okkum er nýtt, og felagið er nústaðni skrásett. Kappingin er hørð um fiskavørurnar, men vit fara so at royna at fáa ein part av hesum marknaði, sigur Per Mikkelsen á Rainbow Seafood.

# Tað ýðir við lívi á Skálafjørðinum

**Ein maður fekk 1600 pund av toski, og ein annar fekk sløk 1200 pund.**
**- Fiskurin, sum er inni á fjørðinum, er ikki rak; hann er fullur av sild og brislingi, sigur Per Mikkelsen, sum aftur leygardagin fekk sløk 500 pund av toski**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mangt er undarligt.

Í langa tíð - fyri ikki at siga í alt ár - hevur Skálafjørðurin verið ein rættiligur mathjallur hjá eitt nú toski og springarum.

Bátar, sum hava roynt við línu og snøri, hava gjørt heilt góðar dagar.

Ein maður á Strondum fekk herfyri 1600 pund av toski, og fyri góðari viku síðan fekk fiskasølumaðurin, Per Mikkelsen, sum er ættaður av Toftum, sløk 1200 pund av toski.

Leygardagin var hann aftur og royndi eydnuna, og tá fekk hann sløk 500 pund.

Nordafarbáturin, Bakkafossur, ið plagar at seta nót eftir brislingi, fekk eisini ein dagin herfyri fleiri hundrað pund av toski í nótina.

Per Mikkelsen sigur, at í langa tíð hava fleiri springarar ferðast aftur og fram á fjørðinum - uppí sildini og brislinginum.



*Toskur og springarar hava notið gott av tí mathjalli, sum Skálafjørðurin hevur verið í longri tíð.*

### 1200 pund og tveir slánar…

Per sigur, at meginparturin av toskinum, sum er fingin á Skálafjørðinum, er toskur 3 – ella fiskur, sum liggur millum 4 og 6 pund, so hetta er stórur fiskur.

Spurdur, um fiskurin er rak, sigur hann, at av teimum 1200 pundunum, hann fekk tann fyrra dagin, vóru bara 2 ella 3 slánar. Sama var við veiðini tann seinna dagin. Restin var alt góður toskur.

Sum skilst, hava flestu bátar roynt við aliringarnar innanfyri Hulk á Strondum, men roynt hevur eisini verið við eystursíðuna á fjørðinum – og úti á.

Per sigur, at fiskurin er fullur av sild og brislingi. Bara heilt fáir fiskar – einir 2-3 í tali – eru funnir við alifóðuri í maganum.

- Eg trúgvi, at lágættarvindurin seinastu dagarnar hevur ført fiskin inná fjørðin, og her er nógv føði; tí fer fiskurin ikki útaftur.

Per, sum í mong ár hevur havt sum ítriv at vera á floti í frítíðini, sigur frá royndum útróðrarmonnum, at tað er ikki óvanligt eftir avlandsvind at fáa reyðfisk úti á.

- Tí trúgvi eg, at veðurlagið eisini hevur havt sín týdning, nú toskurin hevur leitað sær inn á fjørðin. Hugsandi er eisini, at minni føði er úti á beint nú, tí fiski-og útróðrarmenn siga, at nógvur fiskur stendur nær landi í løtuni.

### Søkir ljósið…

Per heldur, at ein orsøkin til, at nógvur fiskur júst hevur verið at fingið við aliringarnar, er, at fiskur søkir ljósið í myrkrinum.

- Eg trúgvi, at brislingur og sildin søkja eftir ljósinum, tá ið myrkt er, og so fylgir toskurin við.

Hann heldur ikki, at toskurin beinleiðis søkir eftir føðini, sum fellir frá alingini. Um so var, hevði tað í nógv størri mun sæst aftur í maganum.

- Men í maganum á toskinum er stórt sæð einki alifóður at finna, sigur Per Mikkelsen, sum serliga hevur ligið við aliringarnar í skýmingini og í lýsingini.